## Nýggjur leiðari á MRCC



55 ára gamli Robert Olsen er nýggjur leiðari á MRCC-støðini. Hann varð útbúgvin sum skipsførari í Havn í 1997, men hevur frammanundan drúgvar royndir á sjónum, skrivar MRCC-støðin í tíðindaskrivi. Robert Olsen fór til skips í 1966 og tók skiparaprógv í Esbjerg í 1972. Størv hansara á sjónum fevna víða. Hann hevur í 27 ár verið skipari á fiskiskipum, vaktarskipum, handilsskipum og á havrannsóknarkipi. Seinastu tvey árini hevur hann sum »barge engineer« verið í ovastu leiðsluni á einum boripalli hjá Maersk Contractors í Norðsjónum og í Avstralia. Robert Olsen er ættaður úr Øravík, men hevur fyri ein stóran part búð í Esbjerg.

## Sambandið heldur landsfund

Landsfundurin hjá Sambandsfloksins verður í Róðrarneystinum á Argjum fríggjadagin og leygardagin. Fundurin byrjar fríggjakvøldið klokkan 19 og heldur fram leygarmorgunin klokkan 9.30. Fríggjakvøldið er tann formligi parturin á skránni, meðan leygardagurin verður brúktur til tann politiska partin. Leygarmorgunin kl. 10 leggur Kaj Leo Johannesen, floksformaður, upp til politiskt orðaskifti og eisini fara løgtingslimirnir Johan Dahl, Magni Laksáfoss og Rósa Samuelsen at hava framløgur.

# Gev mær ikki koyrikortið aftur

**Ein ungur maður var í rættinum í morgun ákærdur fyri skilaleysa koyring. Hann hevði sambært løgreglufrágreiðingini koyrt millum 220 og 240 kilometrar um tíman í bygdum øki**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Tit mugu ikki geva mær koyrikortið aftur enn. Eg eri slett ikki egnaður at hava koyrikort.

Tað viðgekk ein ungur maður í rættinum í morgun. Hann er ákærdur fyri skilaleysa koyring og fyri at koma øðrum í vanda í ferðsluni. Hendan koyringin endaði við, at hann misti tamarhaldið á bilinum, sum fleyg tvørtur um ein annan bil, áðrenn hann rullaði fleiri ferðir runt.

Talan er um ein specialbygdan rallybil, ein Subaru Impreza, sum er styrktur við herdaðum stáli.

- Hevði hann ikki verið tað, var hann farin nógv verri, segði ungi bilførarin.

Bilurin gjørdist annars vrak, so helst mundi bilførarin meina við, at hann og hin persónurin í bilinum sluppu betri av tí at bilurin var eyka styrktur.

Ferðin var nógv, tað skerst ikki burtur. Tann ákærdi viðgekk, at hann beint undan óhappið hevði koyrt 240 kilometrar um tíman oman eina brekku, men at hann hevði slakað av, áðrenn hann misti tamarhaldið á bilinum, mitt inni í Klaksvík.

Hann segði orsøkina til óhappið vera, at ein annar bilur koyrdi út fyri hann, og at hann tí mátti snara vinstru um hendan, men av tí at enn ein bilur kom ímóti honum, mátti hann snara út á høgru koyribreyt, og tá var tað at hann misti tamarhaldið á bilinum.

### Koyrir 280

Men júst hetta er ikki í tráð við tað, sum onnur vitni í málinum siga, og tí metti ákærin tað neyðugt at útseta málið, so hini vitnini kunnu kallast inn.

Tann ákærdi vildi annars fegin fáa málið avgreitt í dag, men ákærin, Linda Hesselberg, helt ikki, at málið longur er eitt játtanarmál.

Verjin, Bjørn á Heygum, spurdi ákærda, hví hann koyrdi so skjótt.

- Tað er tað adrinalinkickið, man fær og tann spenningur sum fylgir við, segði ákærdi, sum samstundis viðgekk, at hann og vinmaður hansara ofta koyrdi so skjótt.

- Men hvussu nógv klárar ein slíkur bilur so at koyra, spurdi verjin.

- 280. Tað havi eg roynt á Viðareiðisvegnum, greiddi ákærdi frá.

Talan er sum nevnt um ein serligan rallybil, við 237 hestum og turboløddur.

Annars angraði hin ákærdi, at hann hevði koyrt so skilaleyst.

- Hevði eg kunnað spola tíðina aftur, hevði eg ikki koyrt so skjótt, segði hin ákærdi, sum altso nú má bíða eftir einari avgerð í málinum.




*Tað var ein bilur av hesum slagnum, sum ungi maðurin koyrdi 240 kilometrar um tíman mitt inni í Klaksvík*

# Skeinkja kaffi úr bardiskinum

*Kaggin var áður ølklubbi, men fer nú undir annað virksemi hjá Frelsunarherinum*

**Kaggin var áður ølklubbur, men fær nú eitt munandi øðrvísi innihald. Klokkan 13 í dag gekk ein av stóru dreymunum hjá Frelsunarherinum í Føroyum út: Tey yvirtóku henda bygningin, sum hereftir skal nýtast sum herbergi.**

HJÁLPARARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** - Vit hava leingi leitað eftir betri umstøðum til arbeiðið út frá Herberginum. Nú hava vit umsíðir funnið tað rætta, sigur Sámal Jákup Joensen, majorur í Frelsunarherinum við Sosialin.

Á middegi í dag gjørdist greitt, at eitt av feløgunum hjá Frelsunarherinum í Norðurlondum – Frelsesarmeens Eiendommer a/s - hevði keypti bygningin, har Kaggin hevur hildið til tey seinastu mongu árini.

Bygningurin hevur staðið til sølu í fleiri mánaðir, og er nú seldur til Frelsunarherin.

Hetta serstaka ognarfelagið eigur allar bygningarnar hjá Frelsunarherinum, og ognaði sær í morgun henda føroyska fyri 3,730 mió krónur.

- Hetta er sjálvandi nógvur peningur, sum vit í Føroyum ikki á nakran hátt høvdu kunnað megnað einsamøll.

- Men av tí at vit eru partur av arbeiðinum í Noregi og Íslandi ber hetta til. Vit gleða okkum í øllum førum at kunna taka bygningin í nýtslu, sigur hann.

Nevnast kann at Frelsunarherurin fekk eina rættiliga stóra peningagávu frá Føroya Banka, tá bankin fylti 100 ár.

### Frá bar til herbergi

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at betra um trongu umstøðurnar hjá Herberginum. Ymiskar loysnir hava verið frammi, men ikki fyrrenn nú er tann rætta funnin.

- Bygningurin liggur jú bara smáar 400 metrar frá okkara samkomubygningi, so tað er ikki heilt av leið, sigur Sámal Jákup Joensen.

Hóast tey nú hava ognað sær bygningin verður hann ikki tikin alment í nýtslu enn á sinni. Eitt stórt arbeiði skal gerast við at dagføra og umvæla bygningin til broytta endamálið.

Nógvar av installasjónunum kunnu eisini brúkast í framtíðini, millum annað neyðútgongirnar.

Ætlanin er tó at hava eitt einstakt tiltak í bygninginum um stutta tíð. Hetta verður ein sangcafé, har tey fara at skeinkja kaffi og aðrar slíkar drykkir úr tí gamla bardiskinum.

Ætlanin er síðani at umskapa bygningin til arbeiðið, soleiðis at hann hereftir kann virka sum herbergi og, sum Sámal Jákup tekur til: - Eitt døgntilhald við sera lágari gátt!

Eftir sangcafé'ina verður húsið latið aftur, meðan umbyggingarnar fara fram.

- Stórur tørvur er á bygningum, og tí vóna vit, at vit kunnu lata upp aftur sum skjótast, sigur hann.



### Nógvar gistingar

Eitt av høvuðsmálunum hjá Frelsunarherinum hevur altíð verið at lata gleðiboðskapin og tað sosiala arbeiðið ganga hond í hond.

Tað er, sum tey sjálvi siga tað: "Frelsunarherurin er eitt margfalt og sermerkt trúarsamfelag, sum hevur umsorgan fyri øllum menniskjanum".

Fyri Frelsunarherin í Føroyum eru fleiri týðandi stig tikin hesi seinastu árini. Í oktober 1996 lat ein búfelagsskapur upp og í desember 2000 eitt dagsentur.

Eitt avgerandi stig víðari fram á hesi leiðini varð tikið fyri júst 10 árum síðani, tá sonevnda Herbergið lat upp 1. apríl 1998.

Hagtølini vísa, at síðani Herbergið lat upp í 1998 hevur talið av gistingum verið støðugt vaksandi.

Fyrsta árið vóru 662 gistingar her, men flestar gistingar vóru í 2003, tá 2764 gistingar vóru. Í fjør vóru 1417 gistingar á Herberginum.

Íalt gistu 42 fólk her, av hesum vóru teir 39 menn. Av hesum gistu tvey fólk millum 100 og 200 ferðir á hesum staði.

Við nýggju umstøðunum fáa bæði starvsfólk og hesir borgarar okkara munandi betri umstøður í framtíðini.